Heimarøktin og Serforsorgin
Meginskrivstovan

Økisterapeutur

til Heimarøktina í Suðurstreym

Almanna- og heilsumálaráðið hevur avgjørt at seta á stovn eina økisterapi í øllum landinum. Í hesum sambandi er ætlanin at seta ein økisterapeut í Suðurstreym. Økisterapeuturin skal veita tænastu til fólk við tørvi á uppvenjing og viðlíkahaldi av førleika. Tænastan verður veitt til vaksin yvir 18 ár, ið búgva heima ella í eldrasambýlum kring landið.

Økisterapi er eitt nýtt tilboð, ið skal skipast og mennast í tøttum samstarvi við økisleiðslurnar, aðrar samstarvsfelagar og starvsfólkabólkar, ið hava týdning fyri hin einstaka brúkaran.

Økisterapeuturin hevur ábyrgd mótvegis økisleiðaranum.

Í mun til tann einstaka brúkaran skal økisterapeuturin:
- meta um førleika og tørv á tiltøkum
- veita ADL- og funktiónsvenjing
- veita vegleiðing til starvsfólk og avvarðandi í at vera um brúkaran
- veita ergonomiska vegleiðing, undirvísing og ráðgeving til starvsfólk og avvarðandi
- gera uppfylgjandi arbeiði í samband við útskrivan frá sjúkrahúsi
- viðvirka við meting, útvegan og nýtslu av hjálpartólum, húsabroytingum v.m.

Vit sóknast eftir einum ergo- og/ella fysioterapeuti, sum:
- hevur arbeiðsroyndir
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at samskifta við brúkarar og avvarðandi
- hevur hug og hegni at arbeiða tvørfakligt og at samstarva við aðrar stovnar

Vit bjóða:
- eitt nýtt starv við møguleika fyri at skipa og menna starvsinnihaldið
- eitt mennandi umhvørvi við møguleika fyri førleikamenning

Setanar- og lønarviðurskifti:
Økisterapeuturin verður løntur sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag við einaískoyti.

Setanarøkið er Heimarøktin. Tænastustaðurin er í løtuni Suðurstreymoyar Øki.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra fyri Heimarøktina og Serforsorgina, á tlf. 304020 ella Onnu Mariu Oskarsson, økisleiðara á tlf. 317249.

Umsókn við neyðugum prógvum og viðmælum skal sendast til:

Heimarøktin og Serforsorgin
Att: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarður 2, 2. hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 23. august 2004

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Barnagarðurin og vøggustovan við Velbastaðvegin
Á stovninum ganga 101 børn. Stovnurin er skipaður við trimum barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og fýra vøggustovum

www.torshavn.fo

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

Barnagarðin og vøggustovuna við velbastaðvegin eftir

- einum pedagogi at starvast 40 tímar um vikuna á stovu við 20 børnum at byrja 1. September 2004 ella eftir avtalu.

Umsókn
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndum skal vera Barnagarðinum við Velbastaðvegin, Velbastaðvegur 41, 100 Tórshavn í hendi **seinast mánadagin 30. august 2004, kl. 12.00.**

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála við Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya..

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Monu R. Mohr, stovnsleiðara, tlf.31 43 73.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Dagstovnurin í Kaldbak
Stovnurin er skipaður í triggjar vøggustovur við 12 børnum í hvørjari. Aldursbýtið verður tó broytt alt eftir tørvi..

www.torshavn.fo

Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:

nýggja Dagstovnin í Kaldbak eftir reingerðarfólki

- at arbeiða 13 tímar um vikuna at byrja sum skjótast.

Umsókn
saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi **innan týsdagin 31. august 2004.**

Setanarviðurskifti
Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarandi fakfelag.

Meiri fæst at vita
um starvið við at venda sær til Jensinu Magnussen, stovnsleiðara, tlf.27 37 66.

veitst tú ikki tað?

RESTAURANT
MARCO POLO

Starvsfólk søkist

Hervið verður søkt eftir starvsfólki til matstovu okkara, tað er ein fyrimunur um tú hevur góðar royndir innan yrkið.

Meira fæst at vita á tel 21 34 30

RESTAURANT
MARCO POLO
100 TÓRSHAVN · TEL 31 34 30
WWW.MARCOPOLO.FO

Sosialurin 141080

Citroen Berlingo vøruvognur

2.0 HDi, jan. 03. myrkar rútar, sleipikrók, cd box, takboylar, rustviðgjørdur, alufelgur, vetrardekk.

Prísuppskot: 120.000 kr. v/ mvg.

Tlf. 210 298

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Skúlatelda HP NX5000

· 1.4 GHz Intel Pentium M
· 256 MB RAM
· 30 GB Harðdisk
· 15" TFT Skerm
· DVD/CDRW
· Intel Extreme
· 56K Modem
· Tráðleyst Netkort
· USB, IR, FireWire
· MS Windows XP Home
· 1 ára garanti

Einans
kr. 12.375,-
v/mvg

SKÚLATILBOÐ

Multimedia Fartelda við WideScreen HP Pavilion ZT-3232

1.6 GHz Intel Pentium M ·
512 MB RAM ·
60 GB Harðdisk ·
15.4 " TFT Widescreen ·
DVD-RW ·
ATI Radeon 64 MB ·
· 56K Modem ·
Tráðleyst Netkort ·
USB, IR, Firewire ·
MS Windows XP Home ·
1 ára garanti ·

Einans
kr. 17.980,-
v/mvg

COM-DATA
Klaksvík tlf. 476100 Saltangará tlf. 449640

Hevur tú vitan um børn og vaksin við skerdum førleika?

- So hava vit brúk fyri tær!

Vit sóknast eftir tveimum eldsálum - einum deildarleiðara og einum serráðgeva til Brekdeildina á Almannastovuni - at ráðgeva vaksnum og børnum við skerdum førleika og familjum teirra. Størvini geva møguleika fyri ávírkan, breiðum samstarvi og spennandi umhvørvi. Brekdeildin er ein landsumfatandi serdeild á Almannastovuni, sum veitir ráðgeving um alt landið og arbeiðir í tøttum samstarvi við økisdeildirnar á Almannastovuni.
Brekdeildin samstarvar við aðrar stovnar, sum veita tænastur til fólk við breki, t.d. skúlan, ansingarstovnar, Sernámsdepilin, Serforsorgin. Bæði størvini innibera ferðing um alt landið.

Deildarleiðari til Brekdeildina

Arbeiðs- og ábyrdgarøki
- ábyrgd av leiðsluni á deildini
- samskipan av arbeiðinum á deildini
- ráðgeving av vaksnum við breki
- ráðgeving av familjum við brekaðum børnum
- samstarv við aðrar fakbólkar

Útbúgving
- hóskandi útbúgving

Arbeiðsroyndir - førleikakrøv
- royndir innan leiðslu
- kunnleika til almannaverkið
- evni at eggja og menna starvsfólk
- góð samstarvsevnir
- evnir at seta í verk fyriskipanir
- evnir at orða seg munnliga og skrivliga
- góðan kunnleika til EDV

Serráðgevi til Brekdeildina

Arbeiðs- og ábyrdgarøki
- at ráðgeva og vegleiða vaksnum og børnum við skerdum likamligum og/ella sálarligum førleika og familjum teirra
- viðgera og avgera umsóknir um stuðul og hjálpartiltøk
- veita almenna ráðgeving og vegleiðing

Útbúgving
- viðkomandi útbúgving, t.d. sosialrágevi, námsfrøðingur, lærari, sjúkrarøktarfrøðingur
- ynskiligt er, at tú hevur viðkomandi eftirútbúgving

Arbeiðsroyndir - førleikakrøv
- royndir innan fyrisiting
- duga at arbeiða sjálvstøðugt
- hava hug og dirvi at taka við nýggjum avbjóðingum
- evni til at seta í verk fyriskipanir
- evni og vilja til samstarv og at arbeiða tvørfagligt og við heildarloysnum
- evni til orða seg munnliga og skrivliga
- kunnleika til EDV

Sosialurin

ALMANNASTOVAN

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, tlf. nr. 353510. Umsóknir skula sendast Almannnastovuni , J. Bronckssgøta 27, postsmoga 3096, FO - 110 Tórshavn innan 25. august 2004 kl. 12.00.